


BAKKAFROST





Bakkafrost samtakið framleiðir laks og liðugvørur úr laksi. Framleiðslueindirnar eru í Norðoyggjum og suður Eysturoy, skipaðar í 3 smoltstøðum, 7 alistøðum, 1 kryvjivirki í Klaksvík, portiónsvirki og kassavirki á Glyvrum. Vøruúrvalið er breitt innan laksavørur. Høvuðsvøran er laksaportiónir til retail marknaðin í ES.

Tað starvast umleið 300 fólk í samtakinum.

## Maskinmeistari

**Søkt verður eftir maskinmeistara/ maskinmanni til Faroe Salmon Processing.**

Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving. Arbeitt verður saman við einum maskinmeistara á einari av tveimum skiftivaktum.

Tann, ið settur verður, skal kunna arbeiða sjálvstøðugt. Starvið verður sett skjótast tilber.

Løn og setanartreytir eru í samráð við leiðsluna.

**Starvsstaður:** á Glyvrum.

**Umsóknarfreist er :** 30/11

Áhugað biðjast senda umsókn til:

Faroe Salmon Processing
Bakkavegur
FO-625 Glyvrar
kari@bakkafrost.com

Bakkavegur 8 · FO-625 Glyvrar · Telefon: 40 50 00
bakkafrost@bakkafrost.com · www.bakkafrost.com

Sosialurin / KvR 34 18 00

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ

## Grunnurin frá 1989 til sosial endamál í Føroyum

Gjørt verður kunnugt, at nú kann søkjast um stuðul úr grunninum frá 1989 til sosial endamál í Føroyum.

Grunnurin er ein samanlegging av 3 grunnum: "Sparekassefonden", "Julemærkelegatet til fordel for syge og svagelige børn på Færøerne" og "Legat af 1989 for sociale formål på Færøerne". Endamálini í teimum nú fyrrverandi grunnunum verða førd víðari í tí samanlagda grunninum.

Endamálið í tí samanlagda grunninum er at veita stuðul til persónar búsitandi í Føroyum, sum vegna ólukku, sjúku ella aðrar umstøður hava serstakan tørv á fíggjarligum stuðli.

**Hesir málbólkar kunnu søkja:**
- eftirsitandi, sum onga skaðabót fáa sambært vanlukkutryggingarlógini, umframt á annan hátt at virka fyri at bøta um neyð millum íbúgvar í Føroyum,
- sjúk og veik børn undir 15 ár, sum eru búsitandi í Føroyum, ella til felagsskapir, sum varða um teirra áhugamál,
- einkjur og eftirsitandi børn,
- sjúk, herundir hjálp til sjúkuviðgerð og endurvenjingaruppihald (serliga á Hvíldarheiminum Naina í Tórshavn) og
- serliga treingjandi einkjur og einkjumenn ella einlig.

**Umsóknir skulu sendast til:**
Stýrið fyri grunnin frá 1989 til sosial endamál í Føroyum
Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknir skulu vera stýrinum í hendi í seinasta lagi mánadagin, tann 7. desember 2009, kl. 12.

**Stýrið**

ALMANNAMÁLARÁÐIÐ • EIRARGARÐUR 2 • 100 TÓRSHAVN · TELEFON 30 40 50 • TELEFAX 35 40 45 • E-MAIL: AHS@AHS.FO

